Tema: Vinna

# Høvuðsstaðurin

Valblað Suðurstreymoyar Javnaðarfelags til bý- og skúlaráðsvalið 3. desember 1996

Leygardagur 23. november 1996

## Búskaparligt støðufesti og vinnulig menning

Javnaðarflokkurin vil áhaldandi stríðast fyri, at tann javnvág, sum er komin í búskapin í Tórshavnar kommunu kann halda fram.

Umboð okkara vilja tryggja ein javnan búskaparligan vøkstur. Tað gerst við at bera so í bandi, at kommunan fær økt skattagrundarlagið og sostatt fær goldið munandi aftur av skuldini.

Vit fara at stríðast fyri at vinnan fær best hugsandi møguleikar at byrja nýtt virksemi og at halda fram við og menna verandi virksemi.

Javnaðarumboðini í býráðnum vilja arbeiða fyri at seta á stovn vinnudeild undir býráðnum. Deildin skal hava fasta upphædd á fíggjarætlanini.

Endamálið við hesum er at tryggja, at so nógvar vinnuligar ætlanir sum møguligt kunnu setast í verk í býnum.

Vinnudeildin skal vísa á og eggja fólki við hugskotum um nýggja vinnu og betran av verandi.

At savna og bera víðari vitan um og ráðgeva í tøkniligum, fíggjarligum, løgfrøðiligum, marknaðar og øðrum spurningum verður uppgávan hjá nýggju vinnudeildini.

Soleiðis verður kommunan ein virkin og positivur partur av gerandisdegnum hjá íbúgvunum í høvuðsstaðnum.

Virkisfúsu íbúgvarnir skulu vita, at kommunan er fús at styðja teirra hugskotum.

Tórshavnar kommuna hevur í dag góðar møguleikar at hýsa vinnuligum virksemi.

Sum dømi kann nevnast, at havnaumstøðurnar geva vinnuni í kommununi sera góðar framtíðarmøguleikar. Talan er ikki minst um eina møguliga framtíðar oljuvinnu og møguleikarnar at bjóða høvuðsstaðin fram í hesum sambandi.

Her skal býráðið reka ein virknan og stimbrandi politikk.

Útgevari: Suðurstreymoyar Javnaðarfelag
Ábyrgd: Nevndin




*Tórshavnar havn er eitt gott dømi um, hvussu heppið tað er, at vinnulív og býráðið ganga hond í hond. Ein lítil kommunal íløga í havnaviðurskiftini hevur økt farmaflutningin fleiri hundrað prosent*

# Sjálvandi skal býráðið fáast við vinnulív

**Men tað skal vera við at skapa vinnulívinum fortreytir at virka undir. Býráðið skapar karmarnar, sum vinnan skal fylla út**

– Sjálvandi eigur ein kommuna at fáast við vinnulív. Einki er so sjálvsagt, sum tað.

– Sleppur kommunan ikki at gera sína ávirkan galdandi mótvegis arbeiðsgongdini í býnum, so er als eingin orsøk til at hava eitt býarstýri.

Vit í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag bjóða okkum fram til við m. a. við hesum sjónarmiði í hyggju. Men lat tað verða sagt beinanvegin:

– Kommunan skal ikki beinleiðis inn at reka vinnulív - hon skal skapa fortreytir, sum vinnulívið kann virka undir.

Kommunan skal stimbra vinnulívið.

### Havnin einasta inntøkukeldan

Burtursæð frá skattinum er Tórshavnar Havn einasta inntøkukelda hjá kommunu okkara. Tí eiga vit at gera alt vit kunna til tess at veita havnini størri inntøkur - og tað krevur nakrar íløgur.

Tórshavnar kommuna hevur gjørt nakrar íløgur í havnina. Fyri at økja um farmaflutningin hevur kommunan nýtt nakað av peningi upp á økið uttan fyri molan, har planerað og asfalterað er.

Eisini hevur kommunan dýpt fram við molanum, so størri skip kunnu leggja at. Bert henda íløgan hevur givið kommununi fleiri pengar í kassan, tí møguleikarnir at gera nyttu av longu framdum íløgum, sum bara hava ligið í fleiri ár, er nú munandi betri.

Sum annað dømi upp á, at kommunan roynir at skapa vinnulívinum fortreytir, kann nevnast keypið av bygninginum hjá Saltsøluni á Vestaru bryggju. Býráðið keypti bygningin til tess at hýsa smærri virkjum, sum á henda hátt betur gjørdust før fyri at fáa fótin fyri seg. Ætlanin er, at tey fólk, ið leiga seg inn í hendan bygningin, ikki skulu hugsa um at gera íløgur í bygning fyrstu tíðina, men heldur hugsa um framleiðsluna, um marknaðarføring og um vørumenning.

### Vinningur er í arbeiðsplássum og virksemi

Kommunan hevur ikki keypt bygningin við vinningi fyri eyga - altso vinningi í pengum. Kommunan hevur keypt bygningin fyri at lata fólk við góðum vinnuupskotum sleppa at royna seg. Gongst teimum væl, kunnu tey kansa seinni víðka virksemið - og flyta í egin hølí. Gongst minni væl, ber til at gevast, uttan at standi eftir við skuld í bygningi.

### Vinnulív og býráð samstarva

Tað er á henda hátt, at vit hugsa okkum at kommunan skal taka lut í vinnulívi. Hon skal skapa fortreytir, og tað krevur, at nakrar íløgur verða gjørdar.

Men íløgurnar eru sunnar, og kasta pengar av sær aftur.

Hetta er tað, sum vit kalla skilagóðan og skynsaman fíggjarpolitikk, har vinnulív og kommunumyndugleikin gongur hond í hond, býnum og samfelagnum at frama.

**Høvuðsstaðurin - valblað Suðurstreymoyar Javnaðarfelags**

*Tórfinn Smith, havnarnevndarformaður:*

# Havnin gerast tilfeingisdepil í Atlantshavi



**– Fyri mær tykir tað, sum um landsstýrismaðurin í kommunumálum og ráðgevandi nevndin sita uppi á mánanum og eygleiða Føroyar. Kommunurnar eru ymiskar - og hóast vit sjálvandi skulu føra ein varnan fíggjarpolitikk, so eru avísar íløgur neyðugar - tær eru grundarlag fyri framtíðar vinnu og vinningi**

– Vit kundu sjálvandi lurtað eftir Eilifi Samuelsen ella á ráðgevandi nevndini og latið vera við at gjørt íløgur.

– Vit kundu sjálvandi eisini sagt «nei-takk», tá Eimskip setti seg í samband við okkum – sagt nei til allan hendan økta vøruflutningin. Men vóru vit tá ábyrgdarfullir býráðspolitikarar, spyr Tórfinn Smith, sum er formaður í havnarnevndini hjá Tórshavnar kommunu.

Eg veit ikki, hvat slíkir menn hugsa. Tað tykir, sum um teir sita uppi á mánanum og eygleiða okkum. Tað ber ikki til at skera allar kommunurnar í Føroyum yvir ein kamb. Sjálvandi skulu kommunurnar føra ein varnan fíggjarpolitikk, men hinvegin at nokta okkum at gera skilagóðar íløgur, sum beinleiðis geva okkum vaksandi inntøkur, tá eru vitið minni enn gott er, heldur Tórfinn Smith.

### Tilfeingisdepil í Atlantshavi

– Tórshavnar havn er ein fyritøka. Hon er einasta inntøkukelda hjá kommununi, tá vit siggja burtur frá skattainntøkuni, sigur Tórfinn Smith.

Hann sigur, at fleiri inntøkumøguleikar uttan iva verða í framtíðini, og vísir á, at okkara geografiska støða gevur okkum nógvar møguleikar, sum onnur ikki hava. At vit kunnu vera tilfeingisdepil í Atlantshavi ber eitt nú økta virksemið hjá Eimskip boð um. Annað er so, at oljuvinnan pikkar á dyrnar.

Seinastu árini hevur farmaflutningurin um kaikantin í Havn ligið um 13.000 tons.

– Men her er hend stór broyting. Nú verður roknað við einum árligum farmaflutningi upp á 70-80.000 tons - takkað verið Skipafelagnum Føroyar og Eimskip.

### Íslendingar nýta Havnina sum miðstøð

Íslendska skipafelagið, Eimskip hevur lagt sínar farleiðir soleiðis til rættis, at Havnin er vorðin tilfeingisdepil hjá íslendingum.

Ikki bara fyri høvuðsstaðarøkið kring Reykjavík, men eisini hjá útjaðarøkjunum í Íslandi, sum nýtir Tórshavnar Havn sum transithavn.

– Vit hava í øllum førum eina sterka síðu – og tað er geografiska støða okkara, sigur Tórfinn Smith. Hesari støðu eiga vit sjálvandi at gera okkum dælt av, og her eru nógvir pengar at heinta í framtíðini.

Tórfinn Smith vísir eisini á tað, sum stjórin í Eimskip Johann Olafsson visti á í Sosialin fyri í ár, at orsøkin til teirra vaksandi virksemi í Føroyum er rein business – og einki annað.

– Íslendingar fáa meira burtur úr við at leggja flutningin um Havnina – og tað fáa havnarborgarar eisini, tí kommunan vinnur fitt av peningi.

– Fáa báðir partar vinning burtur úr, so hava vit eina sunna og skilagóða fyritøku, vísir havnarnevndarformaðurin, Tórfinn Smith á.

### Skilagóðar íløgur geva fitt av pengum

Tórshavnar kommuna hevur lagt nógvar pengar í havnaøkið í áttatiárunum, tá alt bar til. Hesar íløgur hava ikki givið nakað serligt av sær, tí tær vóru ongantíð gjørdar heilt liðnar. Íløgan í havnaøkið á Skansabøðunum er upp á einar 125 milliónir krónur, og ein slík íløga skal kasta pengar av sær, heldur Tórfinn Smith.

– Tí hava vit gjørt nakrar íløgur, sum nú ráðgevandi nevndin hjá forsætisráðharranum hartar okkum fyri – skilji tað hann, ið skilja vil.

– Talan var um eina íløgu, sum ikki var virkin. Økið ikki var planerað og ikki asfalterað. At gera hetta arbeiðið hevði kostaði kommununi einar tríggjar milliónir krónur. Síðani hava vit eisini dýpt fram við molanum, so stóru farma- og ferðamannaskipini kunnu leggja at bryggju. Hetta arbeiðið kostaði aðrar tríggjar milliónir, sigur Tórfinn Smith.

– Hesar seks milliónirnar eru íløgur – men sera skilagóðar íløgur – tí tær skapa fortreytir og elva til, at vit aktivera allar hinar 125 milliónirnar, sum frammanundan eru lagdar í havnaøkið - og ikki nóg mikið við tí.

Nú kunnu vit vinna væl meira av peningi, m.a. tí at Eimskip nú nýtir okkara havn sum tilfeingisdepil.

### Hava fyrireikað seg til oljunuvinnuna

– Vit hava í komandi fíggjarætlan sett meir pengar av til vestara kaiøki, sum skal útbyggjast. Í hesum sambandi vísir Tórfinn Smith á økið við Álaker, har eisini møguleikar skulu gerast fyri nýggjum - og kanska á oðrvísi - vinnum.

*– Nógvar kommunur eru fongdar við sonnum oljufeburi. Er havnarmyndugleikarnir í Havn eisini farnir at lukta olju?*

– Ja, hatta kanst tú saktans spyrja, heldur Tórfinn Smith fyri. Og hann leggur afturat:

– Meðan aðrar kommunur hava verið á forsíðunum við teirra oljuætlanum, hava tit einki frætt frá Tórshavnar kommunu. Tað merkir tó ikki, at vit ikki eisini hava fyrireikað okkum. Vit eru sanniliga eisini við í fyrireikingunum til oljuvinnuna - um enn vit hava valt ein annan arbeiðshátt.

Tórfinn Smith greiðir frá, at havnarmyndugleikarnir í Havn sjálvir hava verið á fundum við oljufeløg.

– Endamálið hjá okkum er at spyrja kundan – oljufeløgini – hvat teimum tørvar. Tað nyttar einki, at vit sita her og gera av, hvat vit vilja bjóða oljufeløgunum. Tað verða tey, sum koma at gera av, hvar í Føroyum tey fara at leggja sítt oljuvirksemi.

– Vit kenna sjálvandi ikki úrslitið. Men vit hava kunnað okkum um tørvin – ar beiða út frá tí, og so fáa vit at siggja. Men eisini á hesum øki hevur Havnin náttúrligar fyrimunir - og teir skulu vit sjálvandi skulu gagnnýta, sigur Tórfinn Smith.

**Tórfinn Smith:**
*– Skilagóðar íløgur geva okkum fitt av vinningi*



# HAVNIN VIL HAVA FRÍHAVN



Men landsstýrið hirðir ikki kommununi svar, sum nú í skjótt fýra ár hevur havt umsók liggjandi í landsstýrinum um fríhavn. – Nógvir møguleikar eru at vinna Tórshavnar havn fleiri inntøkur, men landsstýrið mótarbeiðir okkum, sigur Tórfinn Smith, sum er formaður í havnarnevndini hjá Tórshavnar kommunu

Í marsmánaði komandi ár hevur Tórshavnar Havn jubileum. Talan er um eitt fýra ára jubileum - men talan er samstundis um eitt heldur dapurt jubileum, tí tá kann Tórshavnar havn staðfesta, at fýra ár eru liðin síðani kommunan sendi landsstýrinum umsókn um fríhavn. Men svar er einki komið enn.

Tá Tórfinn Smith gjørdist formaður í havnarnevndini reisti hann tankan um fríhavn við tí greiða endamáli at styrkja Tórshavnar havn við størri aktiviteti.

– Vit fóru fyrst til sakførara at kanna, hvussu lógarreglurnar vóru á økinum. Har var eingin forðing, bara ein kunngerð skuldi broytast, greiðir Tórfinn Smith frá. Landsstýrið var við upp á at kanna málið um fríhavn yvirhøvur, og varð ein nevnd sett at kanna málið, sum kom við eini frágreiðing í februar í fjør.

## Frígoymsla - annar møguleiki

Í frágreiðingini, sum nevndin skrivaði, verða nevndir aðrir møguleikar eisini, og nevnir hon møguleikarnar fyri frígoymslu.

Á henda hátt er møguligt at menna føroysku vinnuna, sum so verður betur før fyri at útnytta verandi íløgur og møguliga at skapa nýggj arbeiðspláss við at økja transithandilin og bøta um virksumsøtðurnar hjá vinnulívinum.

Víðari vísir nevndin á, at kommunurnar í Føroyum eiga og reka havnirnar, og at nevndin ikki hugsar sær broytingar á hesum øki.

Tórfinn Smith vísir á, at nógvir møguleikar eru við eini fríhavn og ikki minst við frígoymslum.

– Tá skapa vit møguleika fyri, at fyritøkur kunnu partklarera. Hetta ber partvís til í dag, men tíðarfreistirnar eru ov stuttar. Stovna vit eina frígoymslu, so kunnu vit ímynda okkum, at ein innflytari - sum t. d. selur vaskimaskinur - kann keypa 100 maskinur heim. Hann veit, at allar ikki kunnu seljast beinanvegin, og tí nýtist honum ikki at tollavgreiða fleiri, enn hann kann selja kanska bara eina í senn.

Ein annar møguleiki við frígoymslum er, at tá fáa virki, ið fáa vørur heim úr útlondum við tí í hyggju seinni at tolla ella endurútflyta tær, møguleika at hava vørurnar liggjandi á frígoymslu longri enn í dag og síðani útflyta ella sum nevnt at tolla tær, so hvørt sum tær skulu takast í nýtslu.

Ein annar fyrimunur er, at vinnurekandi kunnu fáa loyvi til at góðska vørur í Føroyum uttan at skula gjalda toll, mvg og punktgjald av rávørunum. Virkin góðsking gevur føroyskum virkjum líka góðan møguleika at útvega sær rávørur, sum virki í øðrum londum hava, sigur nevndin, sum kannaði møguleikar fyri at seta á stovn fríhavnir í Føroyum.

## Gagnnýta og aktivera íløgur

Men hon vísir eisini á, at í nógvum øðrum londum finst meiri rávøra enn í Føroyum. Føroyingar fáa við virknari góðsking atgongd til størri úrval av rávøru uttan at skula gjalda toll, MVG og punktgjald. Virkini kunnu soleiðis framleiða úr bíligari rávøru og fáa bíligari liðnar vørur at flyta út.

Tórfinn Smith undrast stórliga á, at landsstýrið ikki vil svara Tórshavnar kommunu um hetta mál. Hann sigur, at við fríhavn ella frígoymslu verður latið upp fyri nøkrum møguleikum um at gagnnýta eitt aktivt innkeypsmynstur, ið lættir um gjaldføristørvin hjá innflutnings- og framleiðslufyritøkum, ið innflyta rávøru ella lutir til framleiðslu teirra.

– Tað er eingin ivi um, at fríhavnir í Føroyum eru ein týdningarmikil fortreyt fyri at menna marknaðin hjá føroyskum vinnulívi - eisini uttan fyri landoddarnar, heldur Tórfinn Smith.

– Skulu vit hava nakrar vónir um at flyta eitt sindur av tí virksemi, sum í dag fer fram í skotsku og norsku oljuhavnunum, mugu treytirnar her vera eins góðar hjá okkum.

– Tað sum fyri okkum í Havn hevur so sera stóran týdning í hesum døgum er, at vit fáa aktiverað tær íløgur, sum longu eru gjørdar. Og tað krevur ikki so nógvar pengar, heldur Tórfinn Smith, sum vísir á verandi møguleikar á havnaøkjunum í kommununi.

*Tórshavnar kommuna hevur longu gjørt nógvar íløgur á havnarøkinum. Hesar íløgur skulu aktiverast, soleiðis at vit betur kunnu gagnnýta tær, heldur Tórfinn Smith. Kommunan vil hava eina fríhavn, sum skapar stórar møguleikar hjá vinnulívinum í kommununi - bæði tá tað snýr seg um innflutning - men ikki minst tá tað um útflutningin ræður*

